SOSIALURIN

Nr. 45 — 28. JULI 1962 — 35. ÁRG.

Ólavsøkan . . .

(Framhald frá 1. síðu)

Men umstøðurnar fyri svimjing í Havn batnaðu stórliga, tá stadionnevndin fekk í lag at byggja hin frálíka svimjihylin við heitum vatni og góðum sosialum húsum og við føstum starvsfólki at ansa eftir og halda alt reint og hugnaligt. Høvdu ráðini verið at takt hylin, so svomið kundi verið alt árið, so kundi ein sagt: nú er alt í lagi.

Tað er óføra nógv fólk, ið nú dagliga vitjar svimjihylin, og nógv av fólkinum svímur væl.

Undir slíkum góðum viðurskiftum verður nú kappsvimjing á ólavsøku í ár, eins og ver ið hevur tey síðstu árini.

YMIST ANNAÐ

Tað er so mangt, ið er á ólavsøku, og tað er so ymiskt, ið fólk hevur áhuga fyri.

Eitt er nú framsýning Listafelag Føroya. Aftur í ár hevur hetta felag fyrireikað eina slíka framsýning, og man hon eins og hini árini fara at vera dúgliga vitjað.

Annars verður hópur av fundum, bæði kristiligum og verðsligum, studentakabarett, tónleikur og ikki at gloyma dansur.



J.J.-kvintettin úr Reykjavík vitjar Havnina um ólavsøkuna. Teir hava spælt til dans nokur kvøld í Havn. Við teimum er sangarin Rúnar Guðmundsson, sum sæst á miðjuni í myndini.

GRÓT OG SKERVUR

Øll, ið vilja keypa skerv ella grót, eiga at venda sær til kommunukantórið.

Grót og skervur megu vera goldin fyrst, áðrenn tey verða heimtað.

Bilstjórar verða ámintir, at teir ikki kunnu heimta grót ella skerv uttan við einum limi av vegnevndini ella einum umboðsmanni fyri kommununa.

FRØÐBIAR SÓKNAR KOMMUNA

SIGLINGIN

um ólavsøkuna

SMIRIL

Leygardagin	28.7.	kl. 07.00 Vág - Tvøroyri - Tórshavn.
Sunnudagin	29.7.	Eingin sigling.
Mánadagin	30.7.	kl. 07.00 Tórshavn - Tvøroyri - Tórsh.
		kl. 15.00 Tórshavn - Hvalba - Tvøroyri - Vág.

RITAN

Leygardag	28.7.	kl. 07.00 Tórsh. - Hest - Skopun - Tórsh.
		kl. 11.00 Tórshavn - Nólsoy - Tórsh.
		kl. 12.00 Tórshavn - Skopun - Tórsh.
Sunnudag	29.7.	Eingin sigling.
Mánadag	30.7.	kl. 07.00 Tórshavn - Nólsoy - Tórsh.
		kl. 08.00 Tórshavn - Skopun - Tórsh.
		kl. 14.00 Tórsh. - Skopun - Hest - Tórsh.

VIÐOY

Leygardag	28.7.	kl. 06.00 Tórshavn - Hvalba - Sandvík - Tórshavn.

STRANDFARASKIP LANDSINS

TINGIÐ VERÐUR SETT

Vanligt er, at tingið verður sett ólavsøkudag kl. 1 aftan á gudstænastu í Havnar kirkju.

Tað er ein vokur sjón at síggja skrúðgonguna av tingmonnum, embætismonnum og prestum fara frá tinghúsinum í kirkjuna og so aftan á gudstænastuna niðan aftur í tinghúsið.

Men í ár verður tingið ikki sett ólavsøkudag, tí hann fellur á sunnudag. Tað verður sett mánadagin 30. juli kl. 1. Gudstænastan verður kl. 11 mánadagin. — Hesar báðar tímarnar verða allir handlar í Havn stongdir.

—o—

Og so ynskir SOSIALURIN øllum eina væleydnaða ólavsøku!

Forseti Bretlands, MacMillan hevði í gjár fund saman við fakfelagsmonnum, har hann segði teimum frá eitt nú uppskoti frá stjórnini um at seta eitt lønarráð, sum fær til uppgávu at kanna, hvussu stórar lønarhækkingar liggjarstøða landsins tolir.

Nýggi liggjarmálaráðharri Bretlands, R. Mordling var eisini á hesum fundi og skal luttaka í teim samráðingum, sum verða um spurningin.

Ólavsøkuskráin

ÓLAVSØKUAFTAN:

Kl. 1400: Skrúðgonga úr kommunuskúlagarðinum inn á Tinghúsvøllin. Hákun Djurhuus, løgtings., setir ólavsøkuna.
Kl. 1500: Ólavsøkukappróður
Kl. 1500: Studentakabarett.
Kl. 1700: Frelsunarherurin á Vaglinum
Kl. 1700: Studentakabarett
Kl. 1730: Fótbóltsdystur KÍ—B 36
Kl. 1900: Studentakabarett
Kl. 1930: Hondbóltsdystir:
Kvinnur: Fram— Kyndil
Menn: SÍF—Kyndil
Kl. 2000: Møti í meinigheitshúsinum
Kl. 2100: Møti uttanfyri Ebenezer
Kl. 2200: Frelsunarherurin á Vaglinum
Listaframsýning í fimleikahøll kommuskúlans kl. 18—20
Basarur Franciskanarsystranna kl. 3—10.
Almennur dansur - føroyskur og enskur - til midnátt.

ÓLAVSØKUDAGUR:

Kl. 1000: Morgunmøti í Ebenezer
Kl. 1100: Gudstænasta í Havnar kirkju. Viderø prestur prædikar
Kl. 1100: Møti í sali Frelsunarhersinns
Kl. 1400: Havnar Hornorkestur á Vaglinum
Kl. 1400: Kappriðing á Velbastaðvegnum. - Farið verður av Vaglinum kl. 1330
Kl. 1430: Kappsvimjing í Gundadali
Kl. 1530: Fótbóltur TB-B 36
Kl. 1600: Frelsunarherurin á Vaglinum
Kl. 1600: Studentakabaret
Kl. 1730: Hondbóltur: Kvinnur: Fram-Neistin
Menn: VÍF-Neistin og NSÍ-KFUM
Kl. 1800: Møti í meinigheitshúsinum
Kl. 1800: Møti í Ebenezer
Kl. 2000: Frelsunarherurin á salinuum
Kl. 2100: Ólavsøkusamkoma í KFUM
Kl. 2100: Møti uttanfyri Ebenezer
Kl. 2300: Frelsunarherurin á Vaglinum.
Listaframsýning í fimleikahøll kommunuskúlans kl. 14-18
Basarur Franciskanarsystranna kl. 3-10
Almennur dansur: enskur og føroyskur

Kl. 1100: Gudstænasta (Aksel Tórgard prædikar). Landsstýrismenn, løgtingsmenn, prestar og embætismenn ganga úr tinginum oman í kirkjuna. Eftir gudstænastuna niðan aftur í tingið
Kl. 1300: Føroya løgting verður settt.
Kl. 1430: Studentakabaret
Kl. 1600: Studentakabaret.
Listaframsýningin í fimleikahøll kommunuskúlans kl. 14-18



Bíligir skógvar til rættan kvalitet og luxusskógvar til rættan prís.

Skósølan hjá **Jóan Jakku** í Vágsbotni

Skipafelagið Føroyar

TELEFON 1225

Tórshavn

Svimjihylurin

um ólavsøkuna

Ólavsøkuaftan atgongusølan endar kl. 11.
Ólavsøkudag stongt. (Kappsvimjingin hjá Havnar svimjifelag kl. 14.30).
Mánadag atgongumerkissøla endar kl. 10. Opnar aftur kl. 14.

Svimjihylurin